# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg veit, at NATO-samgongan er í góðum hondum nú, og at soleiðis verður tað eisini í framtíðini*

*(Condoleezza Rice)*

# USA ávaraði India

**Amerikonsku myndugleikarnir ávaraðu indisku myndugleikarnar um, at yvirgangsmenn fóru at koma við báti til Mumbai**



*Løgreglan í Mumbai heldur, at yvirgangsmenninir komu við báti, og at teir millum annað brúktu hendan gummibátin*

*Mynd: AP*

Amerikanskir fregnartænastu-agentar kunnaðu sínar indisku starvsbrøður um, at yvirgangsmenn vóru í ferð við at fyrireika eina yvirgangsatsókn at málum í Mumbai. Tað skrivar amerikanska tíðindastovan AP.

Jennifer Loven, ið er tíðindakvinna hjá AP í Washington, sigur seg hava fingið tíðindini frá einum týðandi embætismanni í Bushumsitingini. Hon heftir seg við, at hon fekk tíðindini dagin fyri, at Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, vitjar í India í dag.

Embætismaðurin í Bushumsitingini vil ikki siga, nær teir indisku myndugleikarnir vórðu ávaraðir um eina komandi atsókn, men hann skal tó hava sagt, at tað, sum hendi í Mumbai í síðstu viku, samsvaraði væl við tað, sum indiska fregnartænastan hevði fingið ábendingar um úr USA.

Sambært AP fekk indiska fregnartænastan at vita, at talan var um eina umfatandi atsókn av Mumbai, og at yvirgangsmenninir fóru at koma til býin við báti ella skipi. Aftan á atsóknina fann indiska løgreglan fleiri bátar, sum yvirgangsmenninir høvdu brúkt.

Í India fer Condoleezza Rice væntandi at royna at sissa undisku myndugleikarnar og at ávara teir ímóti at taka nøkur stig mótvegis Pakistan, hóast indisku myndugleikarnir siga seg hava prógv fyri, at yvirgangsmenninir komu haðani. Hon fer væntandi eisini at krevja, at pakistonsku myndugleikarnir gera meiri fyri at steðga tílíkum yvirgangsmonnum.

# Ein rúmdarsteinur kann raka jørðina innan 20 ár



*Tað er lítil vandi fyri, at ein rúmdarsteinur fer at raka jørðina, men møguleikin er har. Hesa myndina tók rúmdarfarið Galileo av rúmdarsteininum Ida í 1993 (Mynd: NASA)*

**Hóast tað er lítil vandi fyri, at ein rúmdarsteinur fer at raka jørðina, halda granskarar, at málið skal takast í størsta álvara**

Í februar fer ein arbeiðsbólkur hjá ST at umrøða, hvat heimssamfelagið skal gera, um vandi er fyri, at ein rúmdarsteinur og jørðin kunnu bresta saman. Granskarar halda, at ein tílík vandastøða kann koma innan 20 ár. Eitt nú vænta teir, at rúmdarsteinurin Apophis kemur tætt at jørðini, men sambært BBC er vandin fyri samanstoyti kortini ikki meiri enn ein til 45.000.

Bretski rúmdargranskarin Richard Crowther, ið starvast á Britain's Science and Technology Facilities Council (STFC), sigur við bretska kringvarpið, at hóast vandin fyri samanstoyti er lítil, noyðist altjóða samfelagið at fyrireika seg til møguleikan, og hvat so skal gerast. Sjálvur er hann í arbeiðsbólkinum, sum ST hevur sett.

Felagsskapurin The Association of Space Explorers hevur skrivað eina frágreiðing um evnið, og har var niðurstøðan, at við altjóða semju eigur tað at bera til at taka stig, sum kunnu beina rúmdarsteinar burtur frá jørðini. Frágreiðingin hjá ASE minnir á, at tað er ikki óhugsandi, at stórir rúmdarsteinar hava rakt jørðina fyrr. Eitt nú halda mong, at tað var ein tílíkur samanstoytur, sum útruddaði dinosaurarnar fyri 65 milliónum árum síðani. Og í 1908 elvdi ein rúmdarsteinur til ein risastóran eld í Tungaska i Sibir. Sambært ASE var hesin eldurin so stórur, at hann hevði lagt ein stórbý sum New York í øsku.

### Kjarnorkubumbu

Granskararnir siga, at teir flestu rúmdarsteinarnir, sum kunnu raka jørðina, eru smáir, og at teir flestu kolast upp í atmosferuni, áðrenn teir koma niður á jørðina. Men teir størru steinarnir, sum kanska eru einar 200 metrar í tvørmát, mugu beinast av kós ella spreingjast, siga granskararnir.

Í frágreiðingini hjá ASE stendur, at tað finnast ymsar loysnir, tá tað snýr seg um at broyta kósina hjá einum rúmdarsteini, sum kemur í so nær jørðini. Tann seinasta loysnin er at spreingja steinin við einari kjarnorkubumbu ella at senda eitt rúmdarfar ímóti steininum, so hann broytir kós eins og í filminum Armageddon.

## STUTT SAGT

### Russland og Venezuela hervenja

Herskip úr Russlandi og Venezuela fóru í gjár undir eina felags venjing í Karibiska Havinum. Venjingin er ikki langt frá amerikanska markinum, og hetta er fyrstu ferð síðani Kuba-kreppuna fyrst í sekstiárunum, at russiski herflotin hevur skip á hesum leiðum.



*Dmitrij Medvedev vil hava betri samband við Suðuramerika (Mynd: AP)*

Venjingin varir tríggjar dagar.

Sambært russiskum myndugleikunum hevur venjingin til endamáls at kanna, hvussu herskip best kunnu verja seg ímóti álopi frá flogførum og yvirgangsatsóknum, eins og herskipini eisini skulu venja at steðga skipumm og bátum, ið smugla rúsevni.

### Leita eftir Mladic

NATO-hermenn vóru í gjár í bosniska býnum Pale og gjørdu húsarannsókn heima hjá skyldfólki hjá tí bosniaserbiska politikaranum Radovan Karadzic, sum nú situr fangi í Haag, hagar hann kom í juli.

NATO hevur illgruna um, at skyldfólk hjá Karadzic hjálpa tí eftirlýsta bosniaserbiska generalinum Ratko Mladic at fjala seg. Hann er skuldsettur fyri umfatandi krígsbrotsverk í borgarakrígnum í gamla Jugoslavia í nítiárunum, og krígsbrotsmanna dómstólurin í Haag hevur givið boð um, at hann skal handtakast.



*Soleiðis sá Radovan Karadzic út, tá hann bleiv tikin (Mynd: Reuters)*